## DAGSINS MEINING

# Felags ábyrgd

Spurningurin um kvinnur í politikki er knappliga aftur vorðin ein aktuellur spurningur. Orðaskiftið um kvinnuliga luttøku í politiskum arbeiði hevur ligið stillt í nøkur ár, men nú er tað so logað uppaftur. Hetta er sera gott. Til komandi býráðsval er sera lívligt virksemi á spunasíðuni, ja, so lívligt, at mong halda, at tað ongantíð hevur verið lívligari enn tað sama. Tað er nógv áhugavert við orðaskiftinum til hetta bý- og bygdaráðsvalið. Orðaskiftið er sera sakligt og nøkur ávis evni eru afturvendandi. Vit kunnu sumdømi taka fundin, sum var mikukvøldið í kvinnuhúsinum á Glyvrum.

Fundurin varð hildin undir yvirskriftini "Felags avgerðir, felags ábyrgd". Henda yvirskrift signalerar, at málið snýr seg ikki um, at grava fleiri skotgravir, har skotið verður eftir hvørjum øðrum. Samfelagið er fyri øll. Kynsbýtið er rættiliga javnt, og tí eiga bæði kyn at vera umboðað í bý- og bygdaráðum. Her eiga avgerðir at verða tiknar í felag til gagns fyri allar borgarar. Tað vil so aftur siga, at tað er ikki avgerandi fyri avgerðina, hvørt hon er tikin av kvinnu ella manni, men tað sum er avgerandi, er, hvørt avgerðin gagnar okkum øllum, felagskapinum og heildini.

Henda støða til javnstøðuspuringin merkir so eisini, at talan er um felags ábyrgd. Tað at taka avgerðir merkir samstundis at taka ábyrgd av avgerðunum. Við at seta hesa yvirskrift yvir javnstøðustrembanina hava kvinnuligu valevnini víst á, at við áliti borgarans verður eisini løgd ein stór ábyrgd á tann, sum verður valdur, tað veri seg kvinna ella maður. Tað tykist, sum bæði orðaskiftið og fokus hava flutt seg í javnstøðumálinum. Hetta er bæði áhugavert og natúrligt, tí javnstøðumálið er ein prosess ella ein tilgongd, har umstøður og mál broytast alla tíðina. Tað er púra greitt, at tær kvinnur, ið nú bjóða seg fram, eru bæði miðvísar og professionellar, og nú tykist veruliga gongd at vera komin á javnstøðumálið. Um henda meting er røtt, vita vit ikki fyri vist, fyrr enn kommunuvalið er av.

Javnstøðumálið er fram um alt ein spurningur um demokrati, um fólkaræði. So leingi, sum bert 9,4% av øllum tinglimum eru kvinnur, ber illa til at tala um føroyskt fólkaræði. Her hongur ikki saman, og her hava allir veljarar eina stóra ábyrgd. Nú snýr tað seg um kommunuvalið. Her er kynsbýtið millum valevnini í teimum stóru kommununum nógv javnari enn, tað nakrantíð áður hevur verið. Sostatt hava veljararnir nú eitt gott høvi tann 9. november at skapa veruliga javnstøðu í bý- og bygdaráðum. Vónandi nýta veljararnir eisini hetta høvið til frama fyri fólkaræði og veruliga javnstøðu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Mentanarpolitikkur komandi 4 árini

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum*
*http://heima.olivant.fo/~eydgunn/*




Í míni skrá fyri býráðsarbeiðinum komandi 4 árini havi eg sett nøkur átroðkandi mál á dagskránna. Nú mentanarleiðari loksins er settur í kommununi, hava vit møguleikan fyri at føra ein skipaðan mentanarpolitikk, ið ikki bert snýr seg um 1 ár í senn, men hugt verður fleiri ár fram í tíðina. Fyrsta uppgávan verður tí, sjálvandi í dialog við tey ið mynda mentanina í býnum í dag, at fáa orða nøkur mentanarpolitisk stevnumið ella ætlannir. Henda 5-10 ára ætlan skal síðan vera støðið undir einum mentannarpolitiskum orðaskifti í býráðnum og enda við, at ætlanin verður samtykt.

**Atlantis.**
Mál ið troðka á at fáa eina loysn eru fleiri. Støðan í Atlantis og harvið trupulleikin hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag má loysast, møguliga er rætt at útbygga Atlantis við einum sali og palli ið kann nýtast til venjingar- og framførðsluhøli, hetta eigur at verða kannað og fáa eina politiska viðgerð. Tað loysir ongan trupulleika at sleppa biografinum og lata sjónleikarafelagi fáa tann partin tí so missa vit tvey fyri eitt. Í øllum førum, eiga vit at hjálpa til at útvega Klaksvíkar Sjónleikarafelag hølir og sømiligar karmar at virka undir.

**Bókasavnið.**
Somuleiðis eigur støða at verða tikin til framtíðina hjá bókasavninum. Eitt álit er gjørt, ið lýsir framtíðartørvin og spurningin um hvønn leiklut bókasavnið skal hava í framtíðini, bæði við atliti til skúlaverkið og Landsbókasavnið. Fyri mær er púra greitt at bókasavnið skal í framtíðini verða meginbókasavn við denti á tænastu til alt skúlaverkið í Norðoyggjum. Eisini av hesi grund, er neyðugt at útbyggja bókasavnið. Ferðsluforðingin má tí gerast millum skúlan og bókasavnið beinanvegin.

**Tónleikur.**
Í vár var ein loysn við venjingarhølum til tónleikarar um at koma undir land, tíverri datt henda ætlan niðurfyri tí hølini vóru nýtt til annað endamál. Ein býur við so blómandi tónleikalívið, sum Klaksvíkin, má hava eitt stað har bólkar kunnu venja og hava framførslur.

Hetta eru nøkur av málinum, ið arbeiðast skal við innan mentanarøkið.

# Umvørvi og trivnaður er so mangt. Tað er eisini friður

**Katrin Dahl Jakobsen**
*valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*




Fyri at tryggja gott umhvørvi og trivnað fyri borgaran er neyðugt at býar- og nú eisini bygdarplanleggingin verður gjørd so væl umhugsað, sum til ber, so ikki verður neyðugt at koma afturumaftur í óðum verkum. Tað ger alt bara dýrari, og troyttandi er tað eisini hjá fólki at skula ganga og langa nevan í borðið her og der, tí planleggingin ikki var, sum hon skuldi. Hugsi serliga um gang frá ferðslu. Allastaðni, har nýggj øki verða løgd út til sethúsabygging, ber til í fyrireikingunum at taka hædd fyri, at her skulu fólk ikki bara búgva, men so sanniliga eisini hava frið. Ikki minst náttarfrið. Aðrastaðni er markvirði sett fyri, hvat ið verður tolt av gangi til dømis frá akførum. Verður hildið, at ov nógvur gangur er ella fer at verða, gera tey ljóðveggir fram við vegum, sum dempa ljóðið væl. Hetta hava vit tíverri ikki tikið so tungt. Men alt ber til at gera betri. Serliga í komandi býlingum, har skaðin enn ikki er hendur. "Fólkið fyrst", plaga vit í Javnaðarflokkinum at minna á. Bilarnir kunnu koma í aðru røð.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Kommunan fyri øll

**Jói Winther**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar kommunu*




Nú er ALS byrja at taka aftirbornar barnapengar frá foreldrum sum gjalda barnapengar. Spurt kann verða hvat verður tað næsta. Tann sama afturberingin er brúkt á sethúsalánum, so helst er meiningin, at taka sethúsa afturberingina eisini. Tórshavnar kommuna má seta eina hjálpartænastu í gongd, sum kann hjálpa borgarunum móti sovorðnum ágangi. Hetta vil gagnað øllum borgarum í Føroyum, og er tað gott at høvuðsstaðurin kann ganga fremst sum ein fyrimynd í tílíkum førum. Best er at steðga hesum, áðrenn hornini koma ov langt framm.

# Barnakonur og Rás Tórshavn

**Jógvan Arge**
*Býráðslimur í Havn*




Nú tykist mala fyri býráðsformanninum. Sambært honum er tað skeldsorð at vera grátandi barnakona.

Havi ikki hoyrt fyrr, at tað er negativt at ganga við barni undir belti. Tvørturímóti er tað nakað av tí mest positiva og lívgevandi, sum finst.

Tað er eisini bøtandi hond at gera vart við, at ein myndugleiki fer út um lógir og reglur og hurlar runt við byggisamtyktum.

Reglurnar eru gjørdar til tess, at myndugleikin skal halda seg innanfyri tær, so borgarin veit, hvør karmurin er, sum hann hevur valt at liva í.

Kundi saktans nevnt fleiri atfinningarverd dømi úr politikkinum hjá býráðssamgonguni.

Eitt er Rás Tórshavn. Á heimasíðu míni spurdi ein borgari um dagarnar, um tað ikki var ein brølari at taka av Rás Tórshavn.

Kundi ikki annað enn geva honum rætt. Her høvdu havnarfólk verðins besta tilboð um fleiri sjónvarpsrásir fyri onki frá kommununi.

Skilti ongantíð hugin hjá býráðssamgonguni at taka burtur eina tænastu, sum var sett í verk av kommununi sjálvari.

Fleiri enn 3000 fólk skrivaðu eisini undir mótmæli móti avgerðini hjá býráðsmeirilutanum.

Í dag skerst neyvan burtur, at havnarborgarar so ella so vórðu vavdir upp í eina roynd at geva Televarpinum ein flúgvandi start.

Tað fekk jú til gávus allan marknaðarpartin, sum tann ókeypis Rás Tórshavn hevði havt.

Við sínum stigi góvu borgarstjórin og hansara fólk borgararnar upp til skutil.

Tað, sum fyrr kanska kostaði nakrar fáar krónur í kommunuskatti, kostar okkum nú nógvar 1000 krónur í part um árið.

Mær tykir, at her setti kommunan business fremri enn borgararnar — og tað ber neyvan til at koma afturumaftur.

# Aftur á ránsferð í Suðuroy

**Hergeir Nielsen**



Vit fingu tíverri rætt í verstu spádómum okkara, og nú svíður sum svøllir.

Samgongan leitar við ljós og lykt eftir at sløkkja, har sløkkjast kann, og setur daglig met her um okkara leiðir.

Fyrst jarðløgdu teir meginbókasavnið, og so kom túrurin til miðnámsskúlan.

Røktarheim og starvssetan fløktu teir í ein ellibita eftir einari løtu.

Teir komu tómhentir suður og teir fóru tómhentir avstaðaftur. Vit hava fregnast eftir 35 mió.kr. stórari fígging av 35 størvum á einum ellis- og røktarheimi, men har er einki.

Málið er ein total fiasko í teirra hondum, og ongar fyrireikingar eru gørdar.

Ikki so frægt at teir hava spurt kommununar eftir.

Og ágangurin heldur fram.

Upplýst er, at Landsverk hevur sagt upp 10 monnum, og at seks av hesum uppsøgdu eru í Suðuroy, sum frammanundan hevur stórsta arbeiðsloysi í landinum.

2,4 mió.kr. stórt avlop er av Øravíkar Hov bergholinum, men tann peningurin skal flytast norðureftir og skal ikki brúkast til tómar hendur um okkara leiðir, sigur samgongan.

Í Suðuroynni eru tvær verkætlanir støðgaðar upp. Breiðkingin av Akravegnum og royndarboringin av Famjinsbergholinum.

Hvat gerast skal við Hvalbiarbergholið, vita vit ikki reint tekniskt, men bráðneyðugt er at fara undir kanningar av, hvat gerast skal.

Um frægast er at gera nýtt, so skal tað raðfestast nú, og minst líka so frammarlaga sum javngomul berghol aðrastaðni.

Vit hava ovurstórt arbeiðsloysið í Suðuroynni og lok er lagt á fleiri verkætlanir her.

Tá so er, er tað skilaleyst at flyta pening, sum er játtaður til Suðuroyar, burtur haðani.

Men tað ger samgongan á nýggjastu ránsferð síni í Suðuroynni, har hon kemur eftir 2,4 mió.kr. at flyta aðrar vegir.

Hesum ganga vit ímóti og skjóta í staðin upp at flyta:

- 0,8 mió.kr. til víðari kanningar av Fámjinsbergholinum,
- 0,8 mió. kr. til víðari kanningar av Hvalbiarbergholinum,
- 0,8 mió.kr. til breiðking av Akravegnum.

Ivasamt er, hvørja lagnu hetta uppskot fær, men hjartaleysir eru teir, um teir ikki unna Suðuroynni tað sindrið, henni var tillutað.

## Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

**Sosialurin**

# Ellis- og røktarheim til minst 60 búfólk

**Annfinn Brekkstein**
*valevni fyri sambandsflokkin til býráðsvali í Havnar Kommunu.*




Fyri at skera hol í sjógvin og loysa upp fyri tí ovurhondstóra tørvinum á ellis - og røktarheimsplássum í Tórshavnar Kommunu, og í miðstaðaranum sum heild, er neyðugt við einum greiðum ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim hevur til endamál at geva kommunum og øðrum møguleika at søkja um studningslán, tá farið verður undir ný- ella umbygging sum skulu nýtast til endamálið. Hetta er tó treytað av at landstýrismaðurin góðkennir byggiætlanina áðrenn farið verður undir at byggja, at studnigslánið er tryggja innanfyri 90% av metingarvirðinum og at viðtøkur fyri heimið eru góðkendar av landsstýrismanninumn.

Barnaansingin er eitt gott dømi um, at kommunurnar megnaðu uppgávuna tá barnaansingin bleiv yvirtikin av kommununum. Í Tórshavnar Kommunu er eingin bíðilisti longur.

Men so er ikki á eldraøkinum, her vanta ellis - og røktarheimspláss til eini 150 fólk vísir ein kanning sum bleiv gjørd fyri hálvum øðrum ári síðani. Og vit vita at hetta tal er vaksið nógv síðani. Ábyrgdin liggur undir Almenna- og Heilsumálaráðnum.

Um Tórshavnar Kommuna skuldi bygt ellis- og røktarheim til ein 60 til 80 fólk,so letur hetta seg ikki gera, tí eingin peningur er tøkur. Peningurin sum varð avsettur er brúktur til ellis- og røktarheim, størsti parturin uttanfyri Tórshavna Kommunu. Landið hevur ábyrgdina av økinum.

Tær verkætlanir sum vóru játtaðar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2003, verða ikki lidnar fyrrenn í 2004 og í 2005.

Tað vil so siga at ikki fyrr enn í fyrsta lagi 2006 er møguleiki at fara undir byggjan av fleiri heimum, um ikki málsøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita..

Ein vælrikin og næstan skuldarfrí kommuna, sum Tórshavnar Kommuna sum vil loysa upp fyri tí ovurhonds stóra tørvi á ellis og røktarheimsplássum í kommununi, er bundin av fíggjarorku landsins.

Hetta gongur út yvir tey eldru í kommununi, trivnaðin og ikki minst tað sum øll hugsa um… hvat við okkum fáa vit nakað pláss tá vit koma at hava brúk fyri tí?

Sum valevni til býráðið vil undirritaði gera alt fyri at fáa eitt greitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur, so kommunnurnar sjálvar kunnu raðfesta og taka ábyrgd av eldraøkinum í kommununum.